# Føroya Handverksmeistarafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2006

Ein lýsing av samfelagsgongdini, gongdini innan byggivinnuna og virkseminum hjá felagnum

# Innihaldsyvirlit

**INNGANGUR**......**3**

UM FHMF......3
MIÐ OG MÁL FELAGSINS:......3
NEVNDIN Í FHMF......4
FYRIMUNIR VIÐ LIMASKAPI Í MEISTARAFELAGNUM......4
*Limaskapur og fyrimunir......4*
*Sáttmálar, starvsfólkamál og setan av fólki......4*
*Myndugleikar, lógir og reglur......5*
*Bransjumál - byggivinnan......5*
*Ymiskt annað......5*

**SAMFELAGSGONGDIN OG BYGGIVINNAN**......**6**

LØNARGJALDINGAR OG HANDVERKSVINNAN......6
ARBEIÐSLOYSI OG MANGUL UPPÁ ARBEIÐSMEGI......7
PRÍSTALIÐ OG REALLØNIN......8

**GONGDIN Í BYGGIVINNUNI**......**8**

LÆRLINGATILGONGD INNAN HANDVERK......10

**MÁL SEINASTA ÁRIÐ**......**11**

**ÓSEMJUR UM SÁTTMÁLASPURNINGAR**......**11**

*Lærlingar og eftirløn......11*
*Reglur fyri burturarbeiði, koyring v.m.......11*

**SEMJA UM NÝTT ABF 06**......**11**

**AÐRIR KARMAR UM ÚTBJÓÐINGAR OG BYGGIMÁL**......**12**

ÚTBJÓÐINGARNEVND......12
SÁTTMÁLI FYRI SMÆRRI ARBEIÐIR......13

**NÝGGJ LÓG FYRI LOKALFELØG**......**13**

**OGNIN HJÁ AVTIKNA HALGIDAGSGRUNNINUM**......**14**

**YMISKT MÁL**......**14**

VAL AV METINGARDÓMARUM TIL YRKISROYNDIR......14
ÓVIRKIN LIMAFELØG......14

**PUNKTGJØLD Á EL-LUTUM**......**15**

**EFTIRÚTBÚGVINGARGRUNNURIN VITAN**......**15**

**YVIRLIT - LIMIR OG NEVNDIR UNDIR FØROYA HANDVERKS-MEISTARAFELAG**......**16**

YVIRLIT YVIR NEVNDIR Í LOKALU MEISTARAFELØGUNUM......16
NEVNDIR FYRI TEKNISKU SKÚLARNAR......18
LIMALISTI - LIMIR LOKALFELØGUNUM Í FHMF......18

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing verður løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Handverksmeistarafelag (FHMF) 17. apríl 2007.

Endamálið við frágreiðingini er at kunna limir um gongdina innan handverksvinnuna og um týðandi mál, sum Føroya Handverksmeistarafelag hevur arbeitt við farna ári.

## Um FHMF

Føroya Handverksmeistarafelag er stovnað í 1957, sum eitt landsfelag fyri handverksmeistarar. Felagið er meginfelag fyri seks lokalfeløg, sum eru:

Havnar Handverksmeistarafelag

Tvøroyrar Meistarafelag

Meistarafelagið í Klaksvík

Eysturoyar Handverksmeistarafelag

Vága Handverksmeistarafelag

Vágs Handverksmeistarafelag.

Í 1996 gjørdist felagið limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og fyrisitingin flutti í Vinnuhúsið.

## Mið og mál felagsins:

- At sambinda øll handverksmeistarafeløg í Føroyum í felagsskap, at lívga og verja lívsmálini og siðvenjuna hjá stættini, og at fremja handverkið og handverksídnað sum heild.
- At virka fyri vælskipaðum næmingaviðurskiftum, sum grundarlag undir lítargóðari útbúgving
- At taka sær av lønar- og arbeiðsviðurskiftum limafelaganna, at fáa í lag sáttmálar við onnur virkisfeløg, og at taka upp samráðingar við yvirvald og stovnar.
- Við upplýsandi og upplærandi kjakfundum, fyrilestrum og skeiðum at búgva út limir felaganna, sum best og stimbra felagsskapin og samanhaldið, at skapa trygg prísviðurskifti til stuðuls fyri krøv limafelaganna og til frama fyri samanhaldið.
- At koma, sum best undan trætumálum millum handverksmeistarar og handverkarar, og at royna at fáa trætumál avgjørd í sátt og semju og sleppa undan arbeiðssteðgi. Um trætumál tekur seg upp, fremur felagið áhugamál handverksmeistaranna so langt sum rímiligt er, og so langt vald tess røkkur.

Handverksvinnan í Føroyum er sett saman av nógvum ymiskum fakum ella vinnugreinum. Sáttmálin millum Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag fevnir um <u>allar</u> greinar innan handverki.

## Nevndin í FHMF

Eftir aðalfundin í 2006 skipaði nevndin seg við Magnus Magnussen sum formanni og Jón Eliasen sum næstformanni. Hinir í nevndini eru Anskar Hansen, Jón Danielsen, Eydna S. Mikkelsen og Gudmund Jacobsen.

Nevndin var sostatt óbroytt í mun til ári fyri.

## Fyrimunir við limaskapi í meistarafelagnum

Flest øll feløg í Føroyum innan handverksvinnuna eru limir í Føroya Handverksmeistarafelag, tí hetta gevur tryggar karmar og greiðar fyrimunir fyri virkir.

Føroya Handverksmeistarafelag er eitt felag í Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) og tí partur av Vinnuhúsinum. Limaskapur gevur tí atgongd til allar tænastur og ráðgeving, sum Vinnuhúsið veitir.

### Limaskapur og fyrimunir

Ein partur av limaskapinum er hjálp við truplum málum. Limir kunnu venda sær til Vinnuhúsið við øllum slíkum. Vit kunnu sjálvandi ikki svara øllum spurningum, men vit hava fingurin á pulsinum, hvat vinnuni viðvíkur og kunnu hjálpa við at finna loysnir.

Man kann siga at limaskapurin er sum at hava eina trygging: Í tí dagliga er vónandi ikki ofta tørvur á okkum, men tá tað leikar á, standa vit aftanfyri virkir.

Limaskapurin er eisini prógv um, at talan er um eina fyritøku, sum ynskir at virka undir skipaðum karmum. Almennir myndugleikar vilja ofta taka atlit til hetta, tá mál vera viðgjørd. Eisini tí teir vita, at henda fyritøkan ikki stendur einsamøll, men hevur eitt sterkt felag aftanfyri seg.

### Sáttmálar, starvsfólkamál og setan av fólki

Arbeiðsgevarafelagið og Handverksmeistarafelagið gera sáttmálar við fakfeløgini vegna limirnar.

Vit veita tykkum hjálp viðvíkjandi øllum sáttmálaspurningum og spurningum sum viðvíkja starvsfólka- og setanarviðurskiftum. Limir fáa alla neyðuga ráðgeving í slíkum málum, og um neyðugt fara vit í rættin við prinsipiellum málum, sum limir reisa.

Limir fáa serliga atgongd til alla kunning á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, harundir:

- Vegleiðingar um setanarviðurskiftir
- Sáttmálar við viðmerkingum og frágreiðingum
- Lidnar setanaravtalur ið kunnu takast niður og útfyllast – fyri ymiskar starvsbólkar

Hetta krevur loyniorð sum bert limir fáa.

Vit kanna eisini lønarlag fyri limir, tá talan er um økir har lønin liggur omanfyri vanliga sáttmálaløn ella um eingin sáttmáli fevnir um økið.

## Myndugleikar, lógir og reglur

Virkir fáa hjálp og ráðgeving við trupulleikum við myndugleikum – t.d. um tey halda, at tey ikki eru rætt viðfarin í mun til onnur.

Um einstakir limir reisa mál, sum hava prinsipiellan týdning fyri vinnuna ella ávísar vinnubólkar og t.d. ynskja lógir og reglur broyttar, verða slík mál eisini viðgjørd.

## Bransjumál - byggivinnan

Vinnuhúsið veitir eina serliga tænastu til limir í Handverksmeistarafelagnum í samband við byggimál. Vit ansa eftir at rætt fer fram, tá byggiharrar – almennir ella privatir – bjóða uppgávur út. Fer ikki rætt fram, kunnu vit í samráð við limirnar krevja broyttar útbjóðingartreytir ella krevja, at ein útbjóðing steðgar.

Handverksmeistarafelagið hevur ásett serligar reglur viðvíkjandi útbjóðingum og byggi-uppgávum, og vit ráðgeva limunum í øllum trætum í samband við slík byggimál. Vit hava eisini avtalu við løgfrøðingar hjá danska Håndværksrådet, sum kunnu veita limum ókeypis ráð í truplum málum.

Á heimasíðuni eru serligir vegleiðingar fyri byggivirkir, sum eru limir t.d. indeks til regulering av byggisáttmálum, greining av kostnaði av einum arbeiðstíma, reglur fyri rokningsarbeiði o.a.

Um limir reisa mál, sum hava prinsipiellan týdning fyri handverksvinnuna, verða tey viðgjørd í nevndini í felagnum, og málið verður tikið upp við røttu myndugleikarnar.

## Ymiskt annað

Tá Vinnuhúsið skipar fyri tiltøkum ella skeiðum, t.d. Vinnudegnum, fáa limir fyrimun. Nøkur tiltøk ella skeið eru einans fyri limir, og í øðrum førum fáa limir 30 % avsláttur í prísinum.

Limir hava eisini atgongd til tiltøk hjá Dansk Industri, sum um teir vóru limir har. Eisini hava vit samstarv við líknandi feløg í grannalondunum, og hetta kann vera hent um virkir arbeiða uttanlands ella ynskja útlendsk sambond.

Partur
1

# Samfelagsgongdin og byggivinnan

## Lønargjaldingar og handverksvinnan

Samlaðu lønargjaldingarnar í 2006 eru vaksnar við 7 % í mun til 2005. Í 2005 var vøksturin í mun til ári fyri niðri á 2,9 %, og bæði í 2004 og 2003 lá lønarvøksturin undir 1 prosent. Vit skulu aftur til 2001 og 2002 fyri at finna vøkstur á sama støði.

Vøksturin í sáttmálalønunum hevur í sáttmálaskeiðnum frá 1. okt. 2005 til 1. okt. 2007 verið 3%, ið fór omaná eftirlønina. Stóri vøksturin í lønargjaldingunum avspeglar óivað baði økt virksemi og fitt av lønarglíðing vegna manglandi arbeiðsmegi.




▪ Mynd 1: Samlaðar lønargjaldingar

Verður hugt at gongdini og lønargjaldingunum innan byggivinnuna, mynd 2, sæst at hesar eru hækkaðar úr 731 til 813 mió. Tað er baði innan vanligt byggivirksemi og innan smiðju og ídnaðarvirksemi at vøkstur hevur verið.

Vøksturin innan byggivinnuna hevur sostatt verið 11,23 %, og hetta er góð 4 % omanfyri miðal lønarvøksturin.

| Vinnugrein | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skipasmiðjur, smiðjur | 107,9 | 123,6 | 130,1 | 130,9 | 124,7 | 130,6 | 146,0 |
| Ídnaður annars | 177,7 | 200,5 | 219,0 | 223,9 | 218,6 | 223,4 | 230,7 |
| Byggivirksemi | 258,9 | 299,9 | 312,0 | 344,3 | 380,6 | 377,3 | 436,7 |
| *Tilsamans* | 544,5 | 624,0 | 661,1 | 699,1 | 723,9 | 731,3 | 813,4 |
| | | | | | | | |
| **% av samlaðu lønargj.** | 11,61% | 11,83% | 11,52% | 12,09% | 12,35% | 12,18% | 12,66% |
| % vøkstur í lønargjalding, handverksvinnan | | 14,60% | 5,95% | 5,75% | 3,55% | 1,02% | 11,23% |

- Mynd 2: Lønargjaldingar í byggivinnuni

## Arbeiðsloysi og mangul uppá arbeiðsmegi

Arbeiðsloysi í Føroyum hevur í fleiri ár verið sera lágt. Í alt 2002 og stóran part av 2003 var arbeiðsloysi niður móti 2 %, og í 2006 endaðu vit aftur á sama støði. Í flestu av grannalondum okkara kemur arbeiðsloysi ongantíð niður um 4 %, og hetta verður roknað sum støðugt arbeiðsloysi.




- Mynd 3: Arbeiðsloysi

Staðfestast kann, at vit í fleiri ár hava uppliva støðugar fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum og nógv virkir havt trupult við at fáa fólk. Handverksvinnan hevur verið hart rakt av hesum. Nógv starvsfólk innan byggivinnuna, bæði timburmenn og elektrikarar, hava leita sær til onnur norðurlond at arbeiða, tí í flestu av grannalondunum er stórur tørvur á arbeiðsmegi.

Handverksmeistarafelagið vísti í ársfrágreiðing síni í fjør á, at neyðugt er at fáa opna okkara arbeiðsmarknað upp, so byggivinnan fær atgongd til arbeiðsmegi.

Nógv hevur verið tosað um loysnir seinasta árið, men enn er ikki komi á mál. Felagið vil tí enn einaferð heita á politiska myndugleikan, tí ein loysn hevur skund. Sum er talan um einvegis trafikk út úr landinum, og menning og útbygging av landi okkara gongur væl seinni enn tað átti.

### Prístalið og realllønin

Myndin niðanfyri vísur gongdina í brúkarapristalinum frá 1. ársfjórðing 2001, tá tað var sett til 100, til 4. ársfjórðing 2006.




- Mynd 4: Prístalið

Prístalið hevur verið rættuliga støðugt seinastu árini, og árligi prísvøksturin hevur ligið á 1,08 %. Hetta merkir samstundis at reallønarvøksturin hevur verið rímuliga stórur hesi árini.

## Gongdin í byggivinnuni

Fyri at lýsa gongdina innan ymiskar partar av byggivinnuni og um landi seinastu árini, hava vit hugt at nøkrum hagtølum.

Mynd 6 vísir innflutningin av tilfari og lutum til byggivinnuna síðan ár 2000. Innflutningurin hækkaði 20% í 2006 í mun til árið fyri. Innflutningurin hevur annars verið rættuliga støðugur seinastu árini.

Innflutningurin seinasta ári er soleiðis vaksin væl meira enn lønargjaldingarnar í byggivinnuni.




- Mynd 5: Innflutningur til byggivinnu í 1.000 kr.

Niðanfyri verður hugt at talinum á nýbygningum, tó eru tølini fyri 2006 ikki tøk enn. Staðfestast kann, at byggingin hevur verið rættuliga støðug árini 2002 til og við 2005. Meðan talið á nýbygdum sethúsum er rættuliga støðugt á millum 160 og 170 hús, er tali av øðrum nýbygningum, baði vinnu- og almennum bygningum, falli í 2004 og 2005 eftir ein "topp" í 2003.




- Mynd 6: Nýbygging skift á sethús og annað

Nógv tann mesta byggingin fer fram í Streymoyarøkinum, har Tórshavn stendur fyri størsta partinum. Myndin niðanfyri vísir tó at talið av sethúsum uttanfyri Havnina ikki er í minking hesi árini.

| | 2003 | 2003 | 2004 | 2004 | 2005 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Sethús | Annað | Sethús | Annað | Sethús | Annað |
| Norðuroya | 16 | 17 | 21 | 11 | 21 | 13 |
| Eysturoyar | 27 | 25 | 50 | 26 | 39 | 11 |
| Streymoyar | 110 | 72 | 81 | 62 | 90 | 63 |
| Vága | 8 | 4 | 12 | 5 | 8 | 3 |
| Sandoyar | 2 | 0 | 3 | 1 | 4 | 2 |
| Suðuroyar | 4 | 12 | 5 | 15 | 7 | 9 |
| Allar Føroyar | 167 | 130 | 172 | 120 | 169 | 101 |

- Mynd 7: Bygging um landi

Bæði landsstýri og kommunurnar hava seinastu árini hildið ein rættuliga javnan íløgukarm. Føroya Handverksmeistarafelag frøðist um hesa gongdina. Tað at bygging og viðlíkahaldsarbeiði hjá tí almenna verður hildið á einum jøvnum støði, er av stórum týdningi fyri byggivinnuna. Samstundis er hetta ein trygging móti alt ov stórum sveiggi í samfelagnum, og vil tí gera búskapargongdina tryggari.

## Lærlingatilgongd innan handverk

Lærlingatilgongdin eftir kreppuna var í hæddini í 2001, tá 230 handverks-lærlingar vóru undir útbúgving. Í 2004 var tali komi niður undir miðal, sum er 171, men í 2005 hækkaði talið nakað aftur. Tøl fyri 2006 eru ikki tøk enn.

Búskapargongdin og útlitini fyri framtíðina hava stóra ávirkan á tilgongdina. Men tað at endurgjaldið til meistarar og virki, tá ið lærlingur er í skúla, lækkaði úr 100% niður í 75%, hevur sannlíkt eisini havt negativa ávirkan á gongdina. Vert er at minna á, at tað enntá hevur verið umrøtt at lække gjaldið enn meira. At gjaldið fer upp og niður, er ikki serliga tryggjandi og er ikki við til at skapa eina javna gongd av lærlingum.




- Mynd 8: Lærlingatilgongd - handverksvinnan

Tað kann tó tykjast løgi at vinnan í góðum tíðum, tá tað manglar fólk, ikki setur fleiri lærlingar við. Hetta er nakað sum yrkisútbúgvingarráðið átti at kanna nærri. Og sum vit staðfestu í fjør, so ber til at staðfesta at handverksvinnan ikki er nóg góð at seta nýtt fólk við.

Partur
2

## Mál seinasta árið

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum av teimum málum sum felagið hevur viðgjørt seinasta árið.

## Ósemjur um sáttmálaspurningar

Nøkur mál tóku seg upp eftir sáttmálasamráðingarnar, partvíst tí óvissa var um nakrar spurningar og eisini tí eingin semja fekst viðv. reglum fyri burturarbeiði, koyring v.m.

### Lærlingar og eftirløn

Eftir samráðingarnar tók ósemja seg upp um eftirløn hjá lærlingum. Handverkarafeløgini hildu at lærlingar áttu at fáa alla hækkingina í eftirlønini, og ikki bert tey 1,5 % sum svaraðu til gjaldið, sum fyrr fór í Halgidagsgrunnin.

Leingi sá út til, at ikki fekst semja um hetta mál, og at tað tí fór at vera lagt fyri nýggja víðkaða gerðarrættin. Handverksmeistara- og Arbeiðsgevarafelagið valdu tó at gera eina síðstu roynd, og í november 2006 eydnaðist at fáa semju.

Semjan merkir, at frá 1. januar 2007 skulu lærlingar, fevndir av lærlingasáttmálanum frá 1. oktober 2005, hava 3% eyka í eftirlønargjaldið. Tað vil siga, at tá verður samlaða eftirlønin til lærlingar 4,5%.

### Reglur fyri burturarbeiði, koyring v.m.

Eitt uppskot til reglur fyri burturarbeiði, koyring o.a. var lagt fram undir samráðingunum, men semja fekst ikki um hetta. Tað darvar báðar partar at tað ikki er semja um greiðar reglur á hesum øki, og ítøkilig trætumál hava tikið seg upp.

Partarnir vóru tó samdir um at seta ein arbeiðsbólk, ið innan 1. oktober 2007 skal hava eina semju um reglur á umrødda økið. Handverksmeistarafelagið hevur gjørt fleiri royndir at fáa eitt glið á hetta málið, men enn er eingin loysn funnin.

## Semja um nýtt ABF 06

ABF eru reglur fyri arbeiðir og útveganir innan byggi- og annleggsvirksemi. Reglurnar eru ein tillaging av donsku reglunum "Almindelige betingelser for arbejder og leverancer i bygge- og anlægsvirksomhed", vanliga kalla AB 92, til føroysk viðurskiftir.

Í alla tað tíð hesar reglur hava verið brúktar í Føroyum, hevur FHMF havt eitt alment fyrivarni til nakrar greinar í umrøddu reglum.

Í 2004 var fari undir eina endurskoðan av hesum almenna fyrivarninum í samband við útbjóðingar. Hetta komst av, at Byggiharra Samtak Føroya (BSF) hevði víst á, at felagið ynskti ikki at fyrivarni verður brúkt í útbjóðingarmálum hjá teirra limum.

Arbeiði hevur tikið drúgva tíð, og báðir partar hava lagt orku í at finna loysnir.

Avtalað um nýggjar byggireglur - kallaðar ABF 06 - var undirskriva tann 28. desember millum Føroya Handverksmeistarafelag og Byggiharrasamtaki.

Semja merkir at partar av almenna fyrivarninum hjá FHMF eru tiknir við inn í ABF, samstundis sum umrødda fyrivarni dettur burtur. Avtalugrundalagið saman við standardskjalið fyri arbeiðstakarasáttmálar tryggjar eisini, at frávik ikki vera gjørd til reglurnar í ABF 06. Avtalan staðfestir hetta:

1. Limir í Føroya Handverksmeistarafelag og Byggiharrasamtaki Føroya binda seg til at nýta ABF 06 uttan frávik í sambandi við øll útboð í Føroyum, sum eru umfatað av lisitatiónslógini, og sum nevndu limir luttaka í.
2. Limir í Føroya Handverksmeistarafelag lata ikki inn standard fyrivarni, tá tilboð verða givin upp á tey byggiarbeiðir, ið nevnd eru í stk. 1 í hesi avtalu.
3. Í sambandi við tey í stk. 1 nevndu arbeiðir verða nýtt hjáløgdu standardskjøl fyri ávikavist arbeiðstakarasáttmálar og setan av trygd.

ABF 06, standardskjal fyri arbeiðstakarasáttmálar og fyri setan av trygd eru tøk á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.

## Aðrir karmar um útbjóðingar og byggimál

Nýggja semjan við Byggiharrasamtakið um ABF 06 er eitt frambrot, sum vit meta kemur at merkja færri ógreiður og ósemjur í samband við útbjóðingar.

Meistarafelagið arbeiðir í løtuni við øðrum viðurskiftum, sum eisini bera á sama bógv.

### Útbjóðingarnevnd

Meistarafelagið hevur hvørt ár nógv byggimál til viðgerðar. Talan er baði um mál undir útbjóðing, har hugt verður eftir um treytirnar fylgja ABF og útjóðingarlógini, og trætur millum virkir og byggiharra, eftir at í verkætlanir eru farnar í gongd.

Sum oftast enda hesi mál hjá FHMF, og mannagongdin hevur verið, at umsitingin í Vinnuhúsinum viðger málini, saman við umboðum fyri nevndina. Trupulleikin er bert, óansæð hvør verður brúktur, at hesir persónar ofta eru inhabilir tí teir sjálvir eru partar av einari útbjóðing.

Havnar Handverksmeistarafelag er í hesum sambandi komið við uppskoti um, at skipa var ein serlig útbjóðingarnevnd, sum er manna við kønum fólki innan útbjóðingarøki, sum í dag ikki eru aktiv í vinnuni longur – nakrar seniorar. Henda nevnd verður útpeika av nevndini í FHMF, men virkar eftir setan leys av nevndini. Uppgávan verður at stuðla umsitingini í Vinnuhúsinum at viðgera trupul útbjóðingar og byggimál.

FHMF samtykti á nevndarfundi í mars at ein slík skipan verður sett í verk. Enn eru persónarnir sum skulu manna nevndina tó ikki tilnevndir.

### Sáttmáli fyri smærri arbeiðir

Seinasta ári hava einstaklingar hava vent sær til umsitingina og spurt um vit hava nakra "avtalu" sum kann gerast millum fólk sum ætla at byggja eini hús og handverksmeistarar. Eisini einstakir meistarar hava spurt eftir slíkum "standardavtalum".

Í Danmark er avtala gjørd millum partarnar sum vara av byggivinnuni (BYG og Håndværksrådet) og brúkaraumboðsmannin um ein standardavtalu um minni arbeiðir. Nevndin í Føroya Handverksmeistarafelag heldur, at tað átti at verið ein fyrimunur bæði fyri limirnar í felagnum og fyri vanliga borgaran um greiðir karmar vóru um øll byggimál. Nevndin arbeiðir tí við at fáa eina slíka standardavtalu til vegar.

Felagið vil í hesum sambandi fegin hoyra frá limum sum kenna til donsku avtaluna, og hava sjónarmið um hana.

## Nýggj lóg fyri lokalfeløg

Føroya Handverksmeistarafelag (FHMF) setti fyri yvir ári síðani ein bólk at viðgera og samskipa lógirnar hjá lokalfeløgunum.

Nevndin staðfesti tó, at sera trupult var at fáa bólkin mannaðan. Umboðini í bólkinum frá Tórshavn og Eysturoy settu fram uppskot um, at umsitingin í Vinnuhúsinum gjørdi eitt uppskot til nýggja lóg fyri lokalfeløgini, og at henda varð løgd fyri nevndina í FHMF.

Eftir at nevnda uppskot til nýggja lóg var viðgjørt og samtykt í FHMF, var tað sent lokalfeløgunum til viðmerkingar. Eftir at ymiskar tilrættingar vóru gjørdar, út frá ynskjunum hjá lokalfeløgunum, er uppskotið endaliga samtykt í FHMF. At enda skal hetta so samtykkjast á aðalfundinum hjá teim einstøku lokalfeløgunum.

Uppskotið er gjørt soleiðis, at sami lógartekstur kann brúkast fyri øll feløgini, og soleiðis, at víst verður til tað sum stendur í lógini hjá FHMF. Hetta merkir, at um semja er um at broyta nakrar av ásetingunum hjá FHMF, so slepst undan at lokalu lógirnar eisini skulu rættast og viðtakast av nýggjum.

Í teimum greinunum sum ikki vísa til lógirnar hjá FHMF, eru reglurnar gjørdar so liðiligar, at smærri frávik kunnu vera í hvussu einstøku lokalfeløgini skipa seg.

Har víst verður til tað sum stendur í lógini hjá FHMF, verður hetta staðfest:

> § 2. Viðvíkjandi teimum í stk. 2 nevndu viðurskiftum verður víst til lógir Føroya Handverksmeistarafelag. Serligar reglur sum koma afturat ásetingunum í lógum Føroya Handverksmeistarafelag eru ásettar í grein 3 og fram.
>
> Stk. 2.
>
> Endamál felagsins
>
> Reglur fyri hvør kann gerast limur og atkvøðubýti
>
> Ærutreytir

Almennar reglur fyri inn- og útliman

Limagjald

Limaskildur

## Ognin hjá avtikna Halgidagsgrunninum

Við sáttmálasamráðingarnar í 2005 var semja gjørd sum merkti, at Halgidagsgrunnurin var niðurlagdur. Undir samráðingunum var samstundis umrøtt at læta restfæi í grunninum sum gávu til teknisku skúlarnar, og tá tóku allir partar undir við hesum.

Nú, langt eftir at grunnurin er uppgjørdur, hevur Føroya Handverkarafelag boða frá, at teir ikki taka undir við tí ætlan sum semja var um, og samstundis mæla teir til at fæi heldur eigur at brúkast til grunn hjá einstaka felagnum, t.d. til at fíggja samlagstrygging.

Meistarafelagið hevur, saman við Landsfelag Handverkarana, boða frá at vit undrast á, at loypi verður frá gjørdum avtalum, serliga eftir at skúlarnir eru kunnaðir um ætlanina. Í øðrum lagi verður ikki mett, at tað sum Føroya Handverkarafelag nú skjýtur upp er í trá við samtyktirnar fyri avtøku av grunninum, og at samlagstrygging fyri limirnar er eitt mál fyri einstøku løntakarafeløgini, og at hetta ikki eigur at blandast upp í umrødda mál.

Meistarafelagið hevur, saman við Landsfelag Handverkarana staðiliga mælt til at vent verður aftur til uppruna ætlanina: At læta restfæi í Halgidagsgrunninum sum gávu til teknisku skúlarnar, so hetta kann koma framtíðar lærlingum til góða.

Enn er tó eingin loysn funnin.

## Ymiskt mál

### Val av metingardómarum til yrkisroyndir

Í august 2006 fekk felagið áheitan frá Yrkisdeplinum um hyggja at verandi metingardómarum til yrkisroyndir. Yrkisdepilin vísti á, at ofta var trupult at fáa dómarar til sveinaroyndir.

Handverksmeistarafelagið endurskoðaði tí verandi lista yvir metingardómarar og roynt var at finna fleiri dómarar fyri hvørt yrki.

Felagið hevur samstundis gjørt vart við, at fleiri grundir kunnu vera til, at tað er trupult at fáa dómarar. Ein grundin er, at lønin fyri hetta arbeiði ikki samsvarar við tað orku sum skal leggjast í og tann inntøkumiss sum dómararnir fáa.

### Óvirkin limafeløg

Føroya Handverksmeistarafelag hevur havt ein trupulleika av at lokalfeløgini í Suðuroy ikki hava verið virkin.

Roynt hevur áhaldandi verið at fingið feløgini í Suðuroy at luttikið aktivt í nevndararbeiðinum, men einki umboð hevur verið á nevndarfundi í 1½ ár. Felagið á Tvøroyri hevur tó eina nevnd, og limagjald verður kraft inn.

Nevndin í FHMF hevur tí tikið avleiðing av hesum og á nevndarfundi var samtykt at boða limavirkjum í sunnaru helvt av Suðuroy frá, at teir framyvir eru beinleiðis limir í FHMF, so leingi lokalfelagið í Vági ikki er virki.

Nevndin í FHMF hevur eisini roynt at fingið feløgini í Suðuroy at lagt saman, men hetta hevur ikki eydnast higartil.

## Punktgjøld á el-lutum

Vinnan hevur í nógv ár víst á, at punktgjøldini á el-lutum átti at verið avtikin.

Í samband við fíggjarlógina í 2004 gekk landsstýri hesum partvíst á møti, við at avgjøldini á ávísum vørubólkum vóru strika.

Tá fíggjarlógin fyri 2006 var til viðgerðar sendi Vinnuhúsið aftur áheitan til landsstýrismannin í fíggjarmálum og heitti á hann um at fáa síðstu punktgjøldini burtur. Víst var á at serliga punktgjøldini á lampum / armaturum geva elinstalatørunum stórar trupulleikar m.a. tí at útlendsk feløg sýnast at vinna útbjóðingar við at umganga reglurnar, so tey sleppa undan nevndu gjøldum.

Á fundi við landsstýrismannin í november 2006 fingu umboð fyri Arbeiðsgevara- og Handverksmeistarafelagið at vita, at ætlanin er at avtaka øll punktgjøldini, men tað var tá ivasamt um politisk undirtøka var millum allar samgonguflokkar um hetta mál.

Enn er tó einki hent viðvíkjandi teimum punktgjøldunum sum eru eftir, men FHMF hevur enn vónir um at punktgjaldið verður avtikið so skjótt sum møguligt.

## Eftirútbúgvingargrunnurin Vitan

Høvuðsendamáli við grunninum vitan er at fremja eftirútbúgving innan handverksvinnuna við at veita fíggjarligan stuðul til limirnar í feløgunum, ið ætla sær á eftirútbúgvingarskeið.

Baði meistarar og sveinar gjalda til skipanina, ið Vinnuhúsið umsitur.

Inngjaldi til grunnin, sum kann veitast sum stuðul, liggur um 300 til 350.000 kr um ári. Útgjaldið úr grunninum er tó tengt at hvussu nógvar umsóknir koma um stuðul, og hetta kann vera alt frá samlaða inngjaldinum niður til uml. 100.000 kr.

Seinastu árini hevur tali av umsóknum ligið lágt, óivað tí flest allar fyritøkur hava ríkiligt at gera. Grunnurin hevur tí havt yvirskot.

Í 2006 vóru bert játtaðar 20 umsóknir, og yvirskoti var tí heilt uppi á 256.000 kr.

Partur
3

# Yvirlit - limir og nevndir undir Føroya Handverks-meistarafelag

## Yvirlit yvir nevndir í lokalu meistarafeløgunum

### Tvøroyrar Meistarafelag

| | Telefon | Fartelefon | Telefax |
|---|---|---|---|
| FO-800 Tvøroyri | | | |
| Óli Joensen, formaður | 37 15 13 | 22 10 90 | |
| Signar Skaalum, næstformaður | 37 24 15 | 21 06 26 | |
| Mortan Petersen | 37 23 00 | 22 00 53 | |
| Kim Kambsgarð | 37 22 05 | 22 49 00 | |
| Arnold Gaard | 37 11 75 | | |

### Havnar Handverksmeistarafelag

| | Telefon | Fartelefon | Telefax |
|---|---|---|---|
| Vinnuhúsið, Smærugøta 9A | 30 99 00 | | 30 99 01 |
| Pauli Hofgaard, formaður | 31 12 20 | 21 28 20 | 31 48 62 |
| Jón Danielsen, næstformaður | 35 07 00 | 21 06 83 | 35 07 05 |
| Magnus H. Magnussen, nevndarlimur | 31 73 52 | 21 77 00 | 31 80 74 |
| Sjúrður Holm, nevndarlimur | 31 08 30 | 21 08 30 | 31 08 42 |
| Mouritz Mohr, nevndarlimur | 31 11 55 | 21 85 36 | 31 11 25 |

### Meistarafelagið í Klaksvík

| | Telefon | Fartelefon | Telefax |
|---|---|---|---|
| Postsmoga 116, FO-700 Klaksvík | 45 57 93 | | 45 57 93 |
| Anskar Hansen, formaður | | | |
| Jan E. Andersen, næstformaður | 45 60 62 | 21 70 62 | 45 70 62 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hilmar Danielsen, kassameistari | 45 66 73 | 22 13 06 | 45 76 73 |
| Jan Nielsen, skrivari | 45 55 51 | 22 00 77 | 45 78 13 |
| Julius Poulsen, nevndarlimur | | | |

## Eysturoyar Handverksmeistarafelag

| | | | |
|---|---|---|---|
| Postsmoga 77, FO-625 Glyvrar | 44 78 54 | | 44 86 07 |
| | | | |
| Regin Joensen, formaður | 44 12 80 | 21 12 80 | 44 12 80 |
| Sylverius Jacobsen, næstformaður | 44 15 08 | 22 89 20 | 44 11 25 |
| Jón Eliasen | 44 41 70 | 58 88 13 | |
| Rasmus Joensen | 44 41 39 | 21 41 39 | |
| Kaj Olsen | 44 13 65 | 22 35 35 | 44 16 44 |
| Haraldur Kjeld | 44 81 55 | 21 81 55 | |
| Per H. Andersen | 42 24 49 | 21 42 21 | 42 23 11 |
| | | | |
| Heidi Davidsen, felagsins skrivari heima | 44 86 88 | 25 39 43 | |

## Vágs Handverksmeistarafelag

Att. Eddie Augustinussen, FO-900 Vágur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eddie Augustinussen, formaður | 37 40 58 | 22 07 28 | 37 41 58 |
| Gudmund Jacobsen, næstformaður | 37 34 86 | | |
| Jóanes Johannesen | 37 32 40 | | |
| Erhard Joensen | 37 30 35 | 22 72 93 | |

## Vága Handverksmeistarafelag

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eydna Mikkelsen, formaður | | | |
| Thorfinn Nielsen, næstformaður | 33 31 17 | 21 41 17 | 33 33 17 |
| Johnfinn á Plógv, nevndarlimur | 33 25 91 | | |
| Tony Davidsen, nevndarlimur | | 50 54 23 | |
| Stig Thomassen, nevndarlimur | 32 25 57 | | 33 39 85 |

## Nevndir fyri teknisku skúlarnar

Tekniski skúli Klaksvík:

Limir: Jan E. Andersen, múraram., Klaksvík og Sylverius Jacobsen, maskinsm. Skála

Varalimir: Hilmar Danielsen, elinnl. Klaksvík og Jón Eliasen, Smiðjumeistari Tórshavn.

Tekniski skúli Tórshavn:

Limir: Mouritz Mohr, tekniskur leiðari, Tórshavn og Eydnu S. Mikkelsen, verkfrøðingur, Tórshavn.

Varalimir: Magnus Magnussen, elinnl. Tórshavn og Jón Eliasen, Tórshavn.

## Limalisti - limir lokalfeløgunum í FHMF

Niðanfyri er limalistið, uppbýttur eftir lokalfeløgunum sum eru limir í Føroya Handverksmeistarafelag.

| **Havnar Handverksmeistarafelag** | | | |
|---|---|---|---|
| Bakaríið á Sandi | 210 | Sandur | bakarí |
| Mylnan | 110 | Tórshavn | bakarí |
| Auto Service P/f | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Berg Motors Sp/f | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Bil- & Maskinverkstaðið | 210 | Sandur | Bilverkstaður |
| Bilasølan v/ Ø. Johannesen | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Ivan Johansen Bilar | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Norð Trukk | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Plátuverkstaðið V/Glenn Perdomo | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Reyni-Service P/F | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Steintór Fagradal Sp/f | 210 | Sandur | Bilverkstaður |
| VR-Bilar Sp/f | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Wenzel P/F | 110 | Tórshavn | Bilverkstaður |
| Articon P/F | 110 | Tórshavn | Byggifelag |
| Bladt Industries A/S | 2000 | Aalborg | Byggifelag |
| Byggitek | 110 | Tórshavn | Byggifelag |
| Byggivirkið Jógvan Berg | 110 | Tórshavn | Byggifelag |
| Debes Danberg, Timburmeistari | 100 | Tórshavn | Byggifelag |
| E. Pihl & Søn Føroyar P/F entrepn. | 2800 | Lyngby | Byggifelag |
| Guttesen & Staksberg P/F | 110 | Tórshavn | Byggifelag |
| J & K Petersen P/F contractors | 110 | Tórshavn | Byggifelag |
| KN-Tagdækning | 7600 | Struer | Byggifelag |
| MT-Højgaard Føroyar | 110 | Tórshavn | Byggifelag |
| NCC Føroya Konsortiet, I/S | 520 | Leirvík | Byggifelag |
| Pílur Sp/F | 100 | Tórshavn | Byggifelag |
| S.H. smíð, spf. v/Hanus Olsen | 188 | Hoyvík | Byggifelag |
| Totalrenovering | 110 | Tórshavn | Byggifelag |
| West-Trading spf. V/M. Thomsen | 165 | Argir | Byggifelag |
| Bulur, spf v/ Jákup Suna Joensen | 416 | Signabøur | Byggimeistari |
| Durhuus, Jóni | 350 | Vestmanna | Byggimeistari |

| | | | |
|---|---|---|---|
| TJK Húsasmíð | 240 | Skopun | Byggimeistari |
| Charles Fríðberg | 160 | Argir | Elinnleggjari |
| Einer Mikkelsen, P/F | 110 | Tórshavn | Elinnleggjari |
| El & Tele | 100 | Tórshavn | Elinnleggjari |
| El.FO | 160 | Argir | Elinnleggjari |
| Elmek | 100 | Tórshavn | Elinnleggjari |
| Eyðun Jespersen P/F | 100 | Tórshavn | Elinnleggjari |
| Fartek | 160 | Argir | Elinnleggjari |
| Install Sp/f | 100 | Tórshavn | Elinnleggjari |
| LM Electric P/f | 110 | Tórshavn | Elinnleggjari |
| Palli á Dul | 165 | Argir | Elinnleggjari |
| Ravtøkni v/Petur Á Dul Patursson | 175 | Kirkjubøur | Elinnleggjari |
| Reel v/Regin Nolsøe | 188 | Hoyvík | Elinnleggjari |
| RMS Elektro Sp/f | 180 | Kaldbak | Elinnleggjari |
| TG - EL Sp/f | 160 | Argir | Elinnleggjari |
| Tummas Eli Hansen | 188 | Hoyvík | Elinnleggjari |
| Sandoy Seafood | 210 | Sandur | Fiskaframleiðari |
| PAM Offshore service | 110 | Tórshavn | Frálandavinna |
| Atlanticpane | 410 | Kollafjørður | Glasvirki |
| Føroya Termovirki P/F | 100 | Tórshavn | Glasvirki |
| Gólvbúni Sp/f | 340 | Kvívík | Gólváleggjari |
| Eyðfinn K. Eyðunsson | 160 | Argir | Handil |
| Klippistovan v/G. Jacobsen | 100 | Tórshavn | Hárfríðkan |
| Salong Bylgjan | 160 | Argir | Hárfríðkan |
| Inntakt | 180 | Kalbak | Heilsøla |
| Frost Sp/f | 110 | Tórshavn | kølimont. |
| Kølemadsen Hirtshals | 9850 | Hirtshals | kølimont. |
| York Refrigeration Føroya | 100 | Tórshavn | kølimont. |
| Baldvin Baldvinsson | 100 | Tórshavn | málarameistari |
| Falkenberg Málarameistararnir | 110 | Tórshavn | málarameistari |
| Henning Sørensen | 160 | Argir | málarameistari |
| Niels Chr. Sørensen P/F | 160 | Argir | málarameistari |
| Niels Nielsen | 188 | Hoyvík | málarameistari |
| Prokope Sp/f | 240 | Skopun | málarameistari |
| Sigvar Hansen | 410 | Kollafjørður | málarameistari |
| Steinbjørn Zachariasen | 100 | Tórshavn | málarameistari |
| Uni Nielsen Fa. | 188 | Hoyvík | málarameistari |
| Uni Zachariasen, Sp/f | 188 | Hoyvík | málarameistari |
| Jákup Johannesen Fa. | 160 | Argir | Málari |
| Jógvan Johansen | 188 | Hoyvík | Málari |
| Pole Mohr Poulsen | 100 | Tórshavn | Málari |
| Býli Sp/f | 100 | Tórshavn | maskinsnikkari |
| J. & B. Kyster sp/f | 100 | Tórshavn | maskinverkstaður |
| Krossteig Sp/f, Múraravirkið | 100 | Tórshavn | maskinverkstaður |
| Líðin Múraravirkið | 410 | Kollafjørður | maskinverkstaður |
| MVH P/f - Maskinverkstaðurin á Hjalla | 110 | Tórshavn | maskinverkstaður |
| Noma-tek P/F | 110 | Tórshavn | maskinverkstaður |
| Tórshavnar Maskinverkst. | 110 | Tórshavn | maskinverkstaður |
| Tórshavnar Skipasmiðja P/F | 110 | Tórshavn | maskinverkstaður |
| Skilling Sp/f | 110 | Tórshavn | optik/ur |
| Radiohandilin Sp/f | 110 | Tórshavn | radioverkstaður |
| Slaktarin í SMS | 110 | Tórshavn | slaktari |
| BSV Bygningssnikkaravirkið P/F | 110 | Tórshavn | Snikkari |
| DPR Snikkaravirkið Sp/f | 188 | Hoyvík | Snikkari |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eyðstein Jacobsen, Fa | 100 | Tórshavn | Snikkari |
| Rói Dahl Jacobsen | 180 | Kaldbak | Snikkari |
| Rúni Sørensen | 100 | Tórshavn | Snikkari |
| Snikkaravirkið í Marknagili Sp/f | 100 | Tórshavn | Snikkari |
| Snikkaravirkið undir Varða | 110 | Tórshavn | Snikkari |
| Træsmiðjan G.L.T P/F | 110 | Tórshavn | Snikkari |
| Andrew Ingvardsson Vang | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| ARBOR | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Argja Byggivirki | 160 | Argir | Timburmeistari |
| Atlantshús | 160 | Argir | Timburmeistari |
| ÁTS Sp/f | 180 | Kaldbak | Timburmeistari |
| Benny Larsen | 188 | Hoyvík | Timburmeistari |
| Bjarni Poulsen Fa | 188 | Hoyvík | Timburmeistari |
| Búsetur | 160 | Argir | Timburmeistari |
| Djóni í Geil Johansen | 110 | Tórshavn | Timburmeistari |
| EM/Húsasmíð Sp/f | 240 | Skopun | Timburmeistari |
| Erling Dalsgaard | 110 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Eyðfinn Vestergaard, Sp/f | 188 | Hoyvík | Timburmeistari |
| Eysturlon Fa. | 110 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Finnur Simonsen | 160 | Argir | Timburmeistari |
| G.A.J. Smíð v/ Gr. A. Joensen | 340 | Kvívík | Timburmeistari |
| Heini Heinesen | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Henning Hansen | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Hergeir Reinert | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Húsavarðartænastan | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| HV. Lutzen P/F | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| J.T.D.-Smíð V/ Heri Thomsen | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Jákup Martin Sørensen | 230 | Húsavík | Timburmeistari |
| Jørgen Christiansen P/F | 187 | Hvítanes | Timburmeistari |
| Karstin A. Joensen | 410 | Kollafjørður | Timburmeistari |
| KS Timburhús | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Martin E. Vang | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Siggert Nielsen | 350 | Vestmanna | Timburmeistari |
| Súni Olsen | 445 | Tjørnuvík | Timburmeistari |
| Thorleif Bjarnason Poulsen | 100 | Tórshavn | Timburmeistari |
| Timbur & Snikkaratænastan | 350 | Vestmanna | Timburmeistari |
| TOBI, (dk) | 3500 | Værløse | Timburmeistari |
| Valbjørn Dalsgarð | 160 | Argir | Timburmeistari |
| Wilhelm G. Poulsen | 160 | Argir | Timburmeistari |
| William Sand Davidsen | 210 | Sandur | Timburmeistari |
| Hjálpirót Sp/f | 188 | Hoyvík | urtag.røkt |
| Demich P/F | 110 | Tórshavn | VVS-virki |
| Hans Dam, Sp/f | 188 | Hoyvík | VVS-virki |
| Maria Poulsen & Co., P/F | 110 | Tórshavn | VVS-virki |
| Poul Åge Joensen, P/F | 100 | Tórshavn | VVS-virki |
| Reno-Vent SP/F | 188 | Hoyvík | VVS-virki |
| Rólant Vidtfeldt | 210 | Sandur | VVS-virki |
| Rør & Blikk | 100 | Tórshavn | VVS-virki |
| Rør-Tænastan v/ Eyðfinn Hansen | 100 | Tórshavn | VVS-virki |
| Kone Elevator | 2400 | København NV | |
| OTIS | 2730 | Herlev | |
| PH Montage A/S | 7860 | Spøttrup | |
| Phønix Tag Esbjerg A/S | 6715 | Esbjerg N. | |

**Meistarafelagið í Klaksvík**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bakaríið Hjá Jórun Sp/F | 700 | Klaksvík | bakarí |
| Bil- & Dekkverkstaðið | 700 | Klaksvík | Bilverkstaður |
| Alfa-Smíð Fa. | 700 | Klaksvík | Byggifelag |
| Kanjon, byggifelagið | 700 | Klaksvík | Byggifelag |
| Malltek Byggivirkið Sp/f | 700 | Klaksvík | Byggifelag |
| Elcom Sp/f | 700 | Klaksvík | Elinnleggjari |
| EL-IN | 700 | Klaksvík | Elinnleggjari |
| Norð-El | 700 | Klaksvík | Elinnleggjari |
| Sigurd Syderbø | 700 | Klaksvík | Elinnleggjari |
| Tummas Thomsen Sp/f | 700 | Klaksvík | Elinnleggjari |
| Anskar Hansen | 700 | Klaksvík | málarameistari |
| Magni Jacobsen | 700 | Klaksvík | málarameistari |
| Jónsvein Christiansen | 700 | Klaksvík | maskinverkstaður |
| Mekanor | 700 | Klaksvík | maskinverkstaður |
| Pomek Sp/f | 700 | Klaksvík | maskinverkstaður |
| Skarðhamar Sp/F | 700 | Klaksvík | maskinverkstaður |
| Jan E. Andersen | 700 | Klaksvík | múrari |
| Contriv Jsp Sp/f | 700 | Klaksvík | radioverkst. |
| Klaksvíkar Sleipistøð P/F | 700 | Klaksvík | skipasmiðja |
| Jógvan A. Absalonsen | 700 | Klaksvík | Snikkari |
| Kinn Sp/f v/Jan Nielsen | 700 | Klaksvík | Snikkari |
| Klaksvíkar Kommuna | 700 | Klaksvík | Stovnar |
| Eiler Jacobsen | 700 | Klaksvík | Timburmeistari |
| H. P. Smíð | 700 | Klaksvík | Timburmeistari |
| Hanus Højgaard | 700 | Klaksvík | Timburmeistari |
| JMP Smíð | 700 | Klaksvík | Timburmeistari |
| Norðhús Sp/f | 700 | Klaksvík | Timburmeistari |
| Pauli Steinberg Byggimeistari Sp/F | 700 | Klaksvík | Timburmeistari |
| Poul Christoffur Joensen | 700 | Klaksvík | Timburmeistari |
| Blikksmiðjan P/F | 700 | Klaksvík | VVS-virki |
| N. J. Arges Blikksmiðja | 700 | Klaksvík | VVS-virki |
| Victor á Lakjuni | 700 | Klaksvík | VVS-virki |

**Tvøroyrar Meistarafelag**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Breyðkassin Sp/f | 800 | Tvøroyri | bakarí |
| Gaards Bakarí, pf. | 826 | Trongisvágur | bakarí |
| Andreasen, Finn | 826 | Øravíkarlíð | Bilverkstaður |
| Shellstøðin Í Trongisvági Sp/F | 826 | Trongisvágur | Bilverkstaður |
| C.N. BYGG FØROYAR Sp/f | 800 | Tvøroyri | Byggifelag |
| Ístak | 827 | Øravík | Byggifelag |
| Simo, spf. | 826 | Trongisvágur | Elinnleggjari |
| Martin í Nesi | 850 | Nes-Hvalba | málarameistari |
| Suðursteinur Sp/f | 800 | Tvøroyri | Málari |
| Bærendsens Teknik, spf. | 800 | Tvøroyri | maskinverkstaður |
| Knútur Nygaard Fa. | 826 | Trongisvágur | maskinverkstaður |
| Martin Bogi Einarson | 826 | Trongisvágur | maskinverkstaður |
| Roest Sp/f | 826 | Trongisvágur | maskinverkstaður |
| S. J. Radio Fa. | 800 | Tvøroyri | radioverkstaður |
| Pauli Lave, spf. | 825 | Froðba | Snikkari |
| Trgv. Maskinsn. Virki, pf. | 826 | Trongisvágur | Snikkari |
| A.H.-Smíð v/ Andrias Holm | 800 | Tvøroyri | Timburmeistari |
| Albert Johannesen Fa. | 826 | Trongisvágur | Timburmeistari |
| Andreas Olsen | 826 | Líðin | Timburmeistari |

| | | | |
|---|---|---|---|
| AÓ Byggifrøði | 800 | Tvøroyri | Timburmeistari |
| Birgir Dimon Fa. | 826 | Trongisvágur | Timburmeistari |
| Finnbogi Niclassen | 826 | Trongisvágur | Timburmeistari |
| Hamar Sp/F | 825 | Froðba | Timburmeistari |
| Hans Ole Andersen Fa. | 800 | Tvøroyri | Timburmeistari |
| Jóan Petur Mortensen | 827 | Øravík | Timburmeistari |
| Kim Kambskarð | 826 | Trongisvágur | Timburmeistari |
| Knud Nielsen | 800 | Tvøroyri | Timburmeistari |
| Mortan Petersen | 800 | Tvøroyri | Timburmeistari |
| Petur Hammer P/F | 800 | Tvøroyri | Timburmeistari |
| SH-Byg | 850 | Hvalba | Timburmeistari |
| Terje Hentze | 800 | Tvøroyri | Timburmeistari |
| TMT v/Signar Skaalum | 800 | Tvøroyri | Timburmeistari |
| Suðuroyarhús v/Thorman Vang | 827 | Froðba | Timburverkstaður |

**Vágs Handverksmeistarafelag**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bakaríið Kringlan | 900 | Vágur | bakarí |
| Elektronik búðin | 900 | Vágur | Elinnleggjari |
| Erhard Joensen | 900 | Vágur | málarameistari |
| Gudmund Larsen | 900 | Vágur | Elinnleggjari |
| Jóanes við Ósagarð | 900 | Vágur | Timburmeistari |
| Jóannes Johannesen Sp/f | 900 | Vágur | Timburmeistari |
| Poul K. Hammer | 900 | Vágur | maskinverkstaður |
| Tangavirkið P/F | 900 | Vágur | maskinverkstaður |
| Vágs Skipasmiðja | 900 | Vágur | maskinverkstaður |
| Virgar Kjærbo | 970 | Sumba | Timburmeistari |

**Eysturoyar Handverksmeistarafelag**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Miðberg P/F | 600 | Saltangará | bakarí |
| BBR - Service Sp/f | 620 | Rúnavík | Bilverkstaður |
| Bilverkstaðið v/ Símun P. & William Berg | 480 | Skáli | Bilverkstaður |
| Esmar Simonsen P/f | 530 | Fuglafjørður | Bilverkstaður |
| Byggi Service | 480 | Skáli | Byggifelag |
| Bygningstænastan Sp/f | 655 | Nes | Byggifelag |
| Element- & Betongvøruvirkið við Gjógv | 476 | Gjógv | Byggifelag |
| JHR Entreprenørar Sp/f | 600 | Saltangará | Byggifelag |
| JLJ- Bygging | 690 | Oyndarfjørður | Byggifelag |
| Sea-Star Contractors Sp/f | 610 | Saltangará | Byggifelag |
| T. N. Bygging | 625 | Glyvrar | Byggifelag |
| Jógvan Marius Hansen | 512 | Norðragøta | Byggimeistari |
| El-Húsið | 600 | Saltangará | Elinnleggjari |
| El-Service | 480 | Skáli | Elinnleggjari |
| El-tænastan P/F | 600 | Saltangará | Elinnleggjari |
| El-Talvuvirkið P/F | 512 | Norðragøta | Elinnleggjari |
| El-teknik Sp/f | 520 | Leirvík | Elinnleggjari |
| JT Electric LTD, Jóannes Thomsen | 530 | Fuglafjørður | Elinnleggjari |
| KEV Sp/f | 620 | Runavík | Elinnleggjari |
| MA-EL, P/F | 490 | Strendur | Elinnleggjari |
| PFJ-EL Sp/f | 470 | Eiði | Elinnleggjari |
| RÓK - EL SP/F | 656 | Saltnes | Elinnleggjari |
| Sunda-El v/Per Holm Andersen | 450 | Oyri | Elinnleggjari |
| O. C. D. Sp/f | 600 | Saltangará | Lastvognskoyring |
| Bethuel Hansen | 620 | Runavík | málarameistari |
| Jørleif Petersen | 530 | Fuglafjørður | málarameistari |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Marne Olsen | 640 | Rituvík | málarameistari |
| Rasmus Joensen | 530 | Fuglafjørður | málarameistari |
| Hans J. Mohr | 530 | Fuglafjørður | Málari |
| FJM maskinverkstaður P/F | 620 | Runavík | maskinverkstaður |
| KJ-Hydraulik | 530 | Fuglafjørður | maskinverkstaður |
| LV Smiðjan | 626 | Lambareiði | maskinverkstaður |
| Mekanik - P/f Olivar Rasmussen | 620 | Runavík | maskinverkstaður |
| Normek Sp/f | 512 | Norðragøta | maskinverkstaður |
| Ingolf Hansen | 620 | Runavík | múrari |
| Regin Joensen | 665 | Skipanes | múrari |
| Radiobúðin | 600 | Saltangará | radioverkstaður |
| Karmur Sp/F | 512 | Norðragøta | Reklamuvirkið |
| Jóannes F. Dahl | 460 | Norðskáli | Rørsmiðjur |
| Skipasmiðjan á Skála pf. | 480 | Skáli | skipasmiðja |
| Aluplast P/f | 512 | Norðragøta | Snikkari |
| AWI Føroyar Sp/F | 620 | Runavík | Snikkari |
| Byggivirkið H.H. spf | 480 | Skáli | Snikkari |
| Hans Leo í Bartalsstovu | 513 | Syðrugøta | Snikkari |
| Haraldur Kjeld | 656 | Saltnes | Snikkari |
| Snikkaravirkið í Rituvík | 640 | Rituvík | Snikkari |
| AK-Smíð v/ Anfinnur Kruse | 470 | Eiði | Timburmeistari |
| Albert Elias Dam | 465 | Svínáir | Timburmeistari |
| Andrass Hansen | 480 | Skáli | Timburmeistari |
| Ásur Sp/f | 520 | Leirvík | Timburmeistari |
| Fuglafjarðar Træsmiðja | 530 | Fuglafjørður | Timburmeistari |
| Haldur Vang Sp/f | 650 | Toftir | Timburmeistari |
| Hans Dávid Á Brúnni | 665 | Skipanes | Timburmeistari |
| Hanus M. Hansen | 530 | Fuglafjørður | Timburmeistari |
| HJH-Bygging Sp/f | 655 | Nes | Timburmeistari |
| Ingi W. Á Tórgarði Fa | 530 | Fuglafjørður | Timburmeistari |
| J + H SP/F v/Arnbjørn Hansen | 520 | Leirvík | Timburmeistari |
| Jan Mohr Sp/f | 530 | Fuglafjørður | Timburmeistari |
| JL-Smíð | 430 | Hvalvík | Timburmeistari |
| Jóan Petur Vang | 450 | Oyrarbakki | Timburmeistari |
| JPK Smíð Sp/f | 520 | Leirvík | Timburmeistari |
| JPO-Bygging Fa. | 512 | Norðragøta | Timburmeistari |
| KBH Byggivirkið Sp/f | 650 | Toftir | Timburmeistari |
| Norðsetur P/f & Nordhaus | 430 | Hvalvík | Timburmeistari |
| Poul Johan Lamhauge | 620 | Runavík | Timburmeistari |
| Sámal Arthursson Hansen | 530 | Fuglafjørður | Timburmeistari |
| Sandur Danielsen | 490 | Strendur | Timburmeistari |
| Tóri Jacobsen | 470 | Eiði | Timburmeistari |
| Hógv p/f | 600 | Saltangará | VVS-virki |
| Zacharias Leitisstein | 620 | Runavík | VVS-virki |
| AB KOMFORT Sp/F | 480 | Skáli | |